# Tríggjar nullloysnir

**Allir tríggir dystirnir í 1. deild endaðu javnir, og teir einastu sum kunnu fegnast um hetta eru klaksvíkingar**

TALV
*Carl Eli N. Samuelsen*

Teir kunnu nú sjálvir avgera FM-heitið í seinasta umfarinum, klaksvíkingar, sum verður eitt serligt felagsumfar har allar deildirnar telva undir sama taki. Staðið er Eysturskúlaaulan, kl 13.00 leygardagin 2. mars. Sunnudagin 3. mars verður stór barna — og ungdómskapping - tann næsta í røðini - leikt á sama staðið. Tekning er við at venda sær til Havnar Telvingarfelag.

### Vestmenningar iðra seg

Enn hava klaksvíkingar ikki roynt at tapt ein dyst, og leygardagin í Klaksvík varð talvgudindan Caissa helst við teimum í toppdystinum móti vestmenningum. Ólavur Simonsen og IM John Rødgaard deildust um stigini í einum rímiliga jøvnum talvi, meðan Torbjørn Thomsen hevði allar møguleikar at basa Rana Nolsøe. Hesin seinni bjargaði sær tó í taptari støðu javnleikin heim.

Stigslúkarin hjá klaksvíkingum, Tummas Martin Anthoniussen (hevur nú heili 8,5 stig av 9!), bjargaði klaksvíkingum frá tapi, tá hann vann á John Jacobsen. Tummas Martin hevur vunnið sær útvið 100 ratingstig ella fleiri, og nærkast nú teimum 2100. Steintór Rasmussen væntaði á klaksvíksliðnum, og tí bleiv pláss fyri Finnbjørn Vang. Mótstøðumaður hansara Kári Durhuus, leikti væl og vann uppiborið.

Enn eiga vestmenningar FM-møguleikan, men í seinasta umfari hitta teir havnarmenn, meðan oddaliðið hittur kollfirðingar. Tískil verður ringt hjá vestmenningum at endurvinna FM-heitið frá 1992.

### Javnt í Havn

Tveir dystir blivu leiktir í Havn, har tann mest áhugaverdi var millum besta havnarliðið og hvalvíkingar. Martin Poulsen, sum í seinastu viku vann sær NM bronsumerki, tapti heldur óvæntað móti Martini Brekká, sum hevur roynst drúgvur í ár. Olaf Berg, sum hinvegin ikki hevði eitt gott NM, vann sær stórt petti av sjálvsálitinum aftur við at vinna á Finnbjørn Zachariassen.

Álitið hjá havnarmonnum í ár, Herluf Hansen, tapti óvæntað móti Sámal Christiansen á triða borði, meðan Andrias Ziska vísti góðar taktir og vann á Bergi Magnussen. 2-2 er undir vanligum umstøðum eitt hampiligt úrslit hjá havnarmonnum móti teimum royndu hvalvíkingunum, men tá talan er um at vinna inn á klaksvíkingar, eru havnarmenn ivaleyst skuffaðir. Havnarmenn hava tó verið sera støðugir í ár, t.d hava teir eins og klaksvíkingar ongan dyst tapt, men kanska leikt ov nógvir javnir dystir.

Triði dysturin í 1. deild varð millum HT 2 og kollfirðingar, sum somuleiðis endaði 2-2. Úrslitið staðfesti at teir á HT2-liðnum nú við vissu flyta niður í 2. deild. Teir hava stríðst væl, og serliga kann liðskiparin á liðnum Jógvan Næs, vera nøgdir við sínum mongu stigum.

### Støðan undan seinasta umfari

| | | |
|---|---|---|
| 1 KTF, Klaksvík | (5-4-0) | 24,5 |
| 2 VT, Vestmanna | (5-2-2) | 23,0 |
| 3 HT, Tórshavn | (4-5-0) | 21,5 |
| 4 KT, Kollafjørður | (2-3-4) | 15,0 |
| 5 TFS, Hvalvík | (2-2-5) | 14,5 |
| 6 HT2,Tórshavn | (0-2-7) | 9,5 |

Seinasta umfar verður sum sagt komandi leygardag 2. mars í Eysturskúlanum, og tá verða hesir dystir: KT - KTF, VT — HT og TFS - HT 2.

### Toftamenn á veg uppaftur

Jens Kristian Hansen og teir av Toftum leika við nærum vissu í 1. deild komandi kappingarár. Teir vunnu 3,5-0,5 (Jákup á R. Andreasen helt javnt móti Jens Kristian) á vestmenningum, sum viðførir eina trý-stigar leiðslu niður til sandavágsmenn, eftir at hesir vunnu tepran sigur á runavíkingum. Vestmenningar muga helst tungu leiðina niður aftur í 3. deild. Toftamenn hitta runavíkingar, meðan sandavágsmenn bjóða klaksvíkingum av í seinasta umfarinum.

Í 3. deild bleiv avgjørt at HT3 vinnur deildina eftir ein 3,5 — 0,5 sigur móti Róki. Fimm stig eru teir nevniliga fremstir undan seinasta umfari.

### Megnarhál í 2. deild

Føroyska liðið í Keypmannahavn varð nakað skert undan dystinum móti AS1904 í vikuskiftinum. Bæði Flóvin Tór Næs og Heini Danielsen væntaðu á liðnum, og tískil varð vónin um at vinna stórt ikki so nógv frammi í tonkunum. Tá rating viðvíkur vóru føroyingar tó petti sterkari.

Men skjótt sást at talan fór at verða um stórsigur, tí eftir umleið fýra tímum var støðan 4,5 — 1,5 til okkara menn, og John Arni Nilssen og Terji Petersen sótu eftir við góðum støðum. Tað eydnaðist eisini hesum báðum at vinna talv teirra, og úrslitið bleiv tí heili 6,5 — 1,5 til útisetar okkara. John Arni, Heini Olsen, Eyðun Nolsøe, Rógvi W. Rasmussen vunnu, meðan Hliðar Hreinsson, Carl Eli N. Samuelsen og Arild Rimestad leiktu javnt. Av sonnum má hetta úrslit metast sum óvanliga gott, men valla nokk til eina óvæntaða uppflyting til fremstu deildina í Danmark. Serliga leiktu John Arni, Heini og Eyðun væl. Rógvi vísti somuleiðis góðan stríðsvilja, meðan Terji vann eitt sera svingandi talv. Teir tríggir javnleikirnir vóru á góðari leið, har eingin var í vanda fyri at tapa.

Støðan undan seinasta umfar:

| | |
|---|---|
| K41 | 31,0 |
| Helsingør | 27,5 |
| Føroyar | 27,0 |
| Skakspilleren | 25,0 |
| Hillerød | 22,0 |
| AS1904 | 20,0 |
| Fredriksberg | 20,0 |
| Lyngby-Virum | 19,5 |

Liðið liggur enn á triða plássinum, men munurin er styttur upp til Helsingør og K41 sum er klárt á odda. 17. mars verður seinasta umfar leikt, og tá verður mótstøðulið føroyinga nettupp K41. Er eitt undur gjørligt?

## Talvið hesa vikuna

**Eyðun Nolsøe (2220) — Bo G. Christensen (2194)**
**2. deild (6. umfar), 24.02.2002**

(Viðmerkingar: Eydun Nolsøe)

Sisilianskt
1.e4 c5 2.Rif3 e6 (populerur variantur nú á døgum, sum eitt nú Anand oftani leikar) 3.d4 cxd4 4.Rixd4 a6 5.Bd3 Fc7 6.0-0 Rif6 7.c4 Bc5 8.Be3 h5 (danin leikar djarvt og ætlar sær kongaálop) 9.h3 b6 [9...Fb6 10.Fb3=] 10.Ric2 Bb7 11.Ric3 Ric6 12.Bxc5 bxc5 13.f4 d6 14.Fe2 0-0-0 [14...Rid4 15.Ff2 Rixc2 16.Bxc2 og hvítur hevur lítlan fyrimun] 15.Rab1 Rh6? 16.b4! cxb4



17.Rid5!! (vakurt offur, sum helst avgerðir talvið. Um t.d 17.Rixb4? Rixb4 18.Rxb4 Fc5+ og svartur vinnur] 17...exd5 18.cxd5 Fb6+ (Rie7 19.Rixb4 og hvítur hevur stóran fyrimun) 19.Kh1 a5 20.dxc6 Fxc6? [20...Bxc6 21.a3 b3 22.Rfc1 við kortini góðum spæli fyri hvítan] 21.Rixb4 axb4 22.Rfc1 Re8 23.Rxc6+ Bxc6 24.Fc2 Kd7 25.Rxb4 Rg6 26.Rc4 Ba8 27.Rc7+ 1-0

## Talvið hesa vikuna II

**Olaf Berg - Finnbjørn Zachariasen**
**1. deild (2. Borð — HT-TFS) 24.02.2002**

1.c4 c5 2.Ric3 Ric6 3.g3 g6 4.Bg2 Bg7 5.e4 d6 6.Rige2 e5 7.0-0 Rige7 8.d3 0-0 9.Be3 f5 10.Fd2 fxe4 11.dxe4 Rid4 12.Bg5 Be6 13.Rixd4 cxd4 14.Rid5 Bxd5 15.cxd5 Fd7 16.Bh3 Fxh3 17.Bxe7 Rf7 18.Bxd6 Bh6 19.Fe2 Re8 20.Fd3 Fh5 21.Kg2 a5 22.f3 Rc8 23.h3 b5 24.Rae1 Rd7 25.g4 Fg5 26.f4 exf4 27.Bxf4 Fh4 28.Bg3 Fg5 29.Fxd4 Rc2+ 30.Rf2 Rxf2+ 31.Kxf2 Rf7+ 32.Kg2 Bg7 33.e5 h5 34.h4 Fxg4 35.Fxg4 hxg4 36.e6 Rf8 37.e7 Re8 38.d6 1-0

# FM í talvi 2002

**FM í talvi fyri eintaklingar verður í skúlanum á Giljanesi seinast í mars mánaði**

TALV
*Tíðindaskriv frá Sandavágs Talvfelag og Talvsamband Føroyar*

Allir telvarar vera við hesum bodnir at kappast um FM- heitið í talvi fyri einstaklingar í skúlanum á Giljanesi í døgunum 23. — 30. mars.

Bólkabýtið verður soleiðis: Landsliðbólkur, Almenni bólkur, Unglingar og Veteranar.

Byrjað verður at telva hvønn dag kl.13, tó telvar Landsliðbólkurin 2 (tvey) umfør týsdagin 26. mars, kl.10 og kl. 17.

Luttøkugjaldið er: Almenni Bólkur 300 kr., Unglingar 150 kr. og Veteranar 150 kr.

Tilmeldingin fer fram við at gjalda luttøkugjaldið á kontonr. 134.383.3 í Føroya Sparikassa, ella 463.449.9 í Føroya Banka.

Tú kanst eisini seta teg í samband við Sandavágs Talvfelag á telefon 227207, 332376, ella tú kanst brúka teldupostadr.

rook@post.olivant.fo

Seinasta freist at boða frá luttøku er tann 15. mars.



H71-StÍF 31-35 (13-17):

# Keðiligt uttan spenning

**Strandingar høvdu fyri tað mesta fult tamarhald á støðuni, tá teir leygardagin vitjaðu hjá H71**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*



*Artur Johansen og teir høvdu lætt spæl, tá teir leygardagin mest sum staðfestu bronsumerkini við at vinna á H71*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tá farið varð undir endaspælið, vóru teir báðir fremstu kandidatarnir til bronsumerkini H71 og StÍF.

Leygardagin hittust tey bæði liðini á Hálsi, men tað var valla ein farri av spenningi undan dystinum um, hvussu leikur skuldi fara. Síðani farið varð undir endaspælið hava strandingar veruliga fingið ferð á, og sæð burtur frá tapinum seinasta vikuskifti fyri KÍF, so hevur pílurin hjá teimum mest sum peiggjað beint uppeftir.

### Eingin vilji

Hjá hoyvíkingum hevur støðan verið júst hin øvugta, og tað var rættiliga skjótt, at orsøkin til hetta var staðfest leygardagin.

Leikararnir hjá hoyvíkingum tykjast hava blandað ímillum vetrar- og summarfrítíð, ella hava teir í øllum førum slept øllum vónum um at gera seg galdandi hetta kappingarárið.

Longu frá fyrsta bríksli sást, at leikarar løgdu lítið í dystin. Lítið bit var í álopsroyndunum, og í verjupartinum tóktist tað ikki bila nakað, at strandingar í øðrum hvørjum álopi sluppu at renna beint ígjøgnum tunnu verjuna.

Úrslitið var sjálvandi, at StÍF rættiliga skjótt vann sær eina hampuliga trygga leiðslu, og so var dysturin í roynd og veru avgjørdur. Munurin vaks kanska ikki, men hinvegin vóru heldur ikki líkindi til, at hoyvíkingar upp á nakran máta høvdu nakrar ítøkjuligar ætlanir um at taka seg saman, so eitt sindur av spenningi kundi koma í dystin.

Tað var tó um reppið, at spenningur kortini kom í dystin. Tá hovyíkingar ikki tóktust motiveraðir, fullu strandingar skjótt í grøvina, har teir tóku sær av løttum. Hetta sá bara út til at ganga heilt væl, men seinastu løtuna var um reppi, at hetta gekk galið. Fýra minuttir fyri leiklok var munurin komin niður í eitt mál, og brádliga hómaðist ein neisti í hoyvíkingunum, men gleðin var tó stokkut. Við tveimum skjótum málum køvdu strandingarnir seinastu vónina, og so var leyst og liðugt seinastu løtuna.

### Alt er avgjørt

Hóast einki enn er avgjørt við 100% vissu í hondbóltsoddinum, so hevur støðan seinastu vikurnar verið tann, at býtið av heiðursmerkjum hevur verið mest sum fastlagt. Vestmenningar endurvinna uttan iva meistaraheitið, og eins ivaleyst fara neistamenn við silvurmerkjunum.

Triðja plássið, sum eitt skifti tóktist at gerast spennandi, má sigast at vera farið inn á Strendur, og tí er spruningurin eisini, hvussu nógv liðini hava at spæla fyri í løtuni. Hetta spegladist eisini aftur í dystinum, og fyri áskoðaran má hesin mangul upp á spenning sigast at vera stórt spell. Í øllum førum var hetta viðvirkandi til, at dysturin leygardagin gjørdist ein hin keðiligast í langa tíð, men vónandi verður hetta ikki galdandi fyri allar dystirnar, sum eru eftir av kappingarárinum. At bæði H71 og StÍF eru før fyri at spæla góðan hondbólt, er lítil ivi um, men hesa ferð vóru tað so bert strandingarnir, sum prógvaðu sín part.

### Dysturin í tølum

**H71-StÍF 31-35 (13-17)**
Málskjúttar:
H71:
Bjarni Wardum 13(1), Halgir Dahl Olesen 6, Finnur Hansson 5(1), Kristjan Petursson 4, Olaf Vestergaard 2, Rúni Patursson 1
StÍF: Artur Johansen 8, Andre F. Danielsen 8, Costin Dumitrescu 6(2), Sveinur Justinussen 6(1), Marius Joensen 4, Bent Djurhuus 2, Janus Trygvason 1
Brotskøst: H71 3, StÍF 4
Útvísingar: H71 5, StÍF 4
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen. Høvdu eina lætta uppgávu.

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 7 | 7 - 0 - 0 | 569 | 335 | 234 | 26 |
| 2 | Stjørnan | 8 | 5 - 1 - 2 | 500 | 413 | 87 | 20 |
| 3 | Neistin | 8 | 5 - 1 - 2 | 449 | 389 | 60 | 19 |
| 4 | VB | 8 | 5 - 1 - 2 | 466 | 469 | -3 | 17 |
| 5 | StÍF | 7 | 2 - 0 - 5 | 359 | 448 | -89 | 5 |
| 6 | Kyndil | 8 | 0 - 1 - 7 | 444 | 536 | -92 | 4 |
| 7 | Sóljan | 8 | 1 - 0 - 7 | 365 | 562 | -197 | 4 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 7 | 7 - 0 - 0 | 571 | 472 | 99 | 25 |
| 2 | Neistin | 7 | 5 - 0 - 2 | 595 | 497 | 98 | 20 |
| 3 | StÍF | 7 | 5 - 0 - 2 | 529 | 513 | 16 | 16 |
| 4 | Tjaldur | 7 | 3 - 0 - 4 | 484 | 537 | -53 | 10 |
| 5 | Kyndil | 8 | 3 - 1 - 4 | 472 | 528 | -56 | 9 |
| 6 | H71 | 8 | 0 - 2 - 6 | 558 | 608 | -50 | 8 |
| 7 | KÍF | 8 | 1 - 1 - 6 | 523 | 577 | -54 | 7 |

## Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Asta Petrauskiene | Sóljan | 169 | (27) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 160 | (49) |
| Ioana Rápa | VÍF | 144 | (33) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 143 | (61) |
| Gabriella Fekete | VB | 123 | (32) |
| Regina Radó | VB | 104 | (24) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 100 | (14) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 100 | (17) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 94 | (37) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 92 | (8) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 92 | (16) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 86 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 81 | (4) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 80 | (11) |
| Alina Olaru | StÍF | 76 | (9) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bjarni Wardum | H71 | 148 | (33) |
| Heini Joensen | Neistin | 134 | (40) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 124 | (15) |
| Høgni Klein | Kyndil | 122 | (10) |
| Finnur Hansson | H71 | 115 | (23) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 115 | (34) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 113 | (12) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 105 | |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 105 | (17) |
| Sámal Joensen | VÍF | 104 | (14) |
| Ingi Olsen | VÍF | 103 | (11) |
| Durica Tomic | KÍF | 101 | (30) |
| Artur Johansen | StÍF | 99 | (11) |
| Iljan Topic | KÍF | 95 | |
| Áki Olsen | VÍF | 83 | (11) |

Sóljan-Stjørnan 20-26 (6-15):

# Skjót avgerð

**Stjørnan rann Sóljuna um koll fyrra partin av dystinum, og so gjørdi tað minni, at tær tóku sær av løttum seinasta hálva tíman**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Tað var skjótt greitt á Giljanesi, hvønn veg tað bar, tá Stjørnan var á vitjan leygardagin.

Kanska var munurin ikki hin øgiliga fyrstu tíggju minuttirnar ella so, men miðskeiðis í hálvleikinum settu favorittarnir úr Klaksvík veruliga ferð á. Sjey mál á rað beindu alt fyri eitt allan iva um sigurin av vegnum, og tó at Sóljan eftir hetta slapp upp í part, so var ikki skuggin av spenningin um, hvør parturin skuldi fara við stigunum.

### Nógv upp á spæl

Dysturin var annars ein av teimum, har nógv stóð upp á spæl hjá báðum pørtum. Sóljan stríðist aftur í ár fyri lívinum í deildini, og enn skulu tær onkursvegna bjarga sær stig, um bjargingin skal gerast veruleiki.

Móti Stjørnuni, sum stríðist fyri silvurmerkjunum, munaði tó lítið, og spurningurin er so, um hetta var tað, sum skuldi til, fyri at fáa Stjørnuna í gongd aftur. Avrik teirra hava als ikki verið eins sannførandi í endaspælinum, sum tey vóru í grundspælinum, og nú er veruligur vandi fyri, at ætlaðu silvurmerkini verða av ongum. Tær hava tó enn møguleikan at gera hetta av sjálvar, tá tær um tvær vikur vitja hjá Neistanum í Havn.

### Dysturin í tølum

**Sóljan-Stjørnan 20-26 (6-15)**
Málskjúttar:
Sóljan: Asta Petrauskiene 7(2), Marjun Johansen 4(1), Heidi Maria Akselsen 4, Heidi Haraldsen 2, Fía Selma Nielsen 2, Jana Jacobsen 1, Jóhanna í Horni 1
Stjørnan: Andrijana Milodanovic 7(2), Simona Dziugyte 5(2), Bára Skaale 5, Joan M. Jeonsen 3, Anna Kristina Samson 3, Beinta Klakstein 2, Jastrid Gullaksen 1
Brotskøst: Sóljan 4, Stjørnan 9
Útvísingar: Sóljan 1, Stjørnan 1
Dómarar úr VÍF: Agnar Joensen & Piti Negru.